Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

Heilsu- og Innlendismálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Saltangará, 8. august 2018.

**<u>Blái Krossur Føroya – Øll hava rætt til góð barnaár</u>:**

Á fundi millum umboð fyri Heilsu- og Innlendismálaráðið (HIMR) og Bláa Kross Føroya (BKF) tann 1. mai 2018 avtalaðu vit, at BKF skuldi senda útgreinandi tilfar og umsókn um játtan til okkara ætlan á økinum "Øll hava rætt til góð barnaár". Hetta er eitt av okkara kjarnuøkjum, sum leiðslan í BKF hevur sett sær fyri at gera meira við, tí vit síggja ein stóran tørv, sum vit í dag lutvíst megna at nøkta. Gleðin er ferfald, tá vit síggja góð úrslit hjá børnunum og familjunum, sum vit koma í samband við.

Vit staðfesta ferð eftir ferð, at børn hjá rúsmisnýtarum eru ein gloymdur og lágt raðfestur bólkur. Evnið er enn bundið av tabu, og hóast nógvar góðar hendur royna at lofta børnunum í barnaárunum, so síggja vit framvegis, at tað er sera neyðugt at hava servitan og árræði at handfara trupulleikarnar, sum eru ógvuliga ymiskir frá barni til barn. Men í høvuðsheitum er trupulleikin kortini tann sami – alt ov nógv børn hava ikki góð barnaár, men tað er vón fyri teimum og familjum teirra.

Í heilsuverkinum verður nú talað um viðgerðartrygd, og okkara ynski er, at hendan eisini fer at umfata umhvørvið við rúsmisnýtslu, har børnini og familjurnar eisini líða av rúsmisnýtsluni hjá teimum vaksnu. Okkara royndir vísa, at vit aftur og aftur møta børnum og ungum, sum ongantíð áður hava møtt einum vaksnum, sum veruliga hevur spurt – og ikki minst lurtað - hvussu tey hava tað, hóast trupulleikin var eyðsýndur.

BKF arbeiðir bæði við upplýsing, fyribyrging og hjálpararbeiði. Okkara fíggjarætlan fyri økið "Øll hava rætt til góð barnaár" vísir, at fíggjartørvurin er uml. 1,8 mió. kr., útgreinað soleiðis á næstu síðu:

Heiðavegur 32 FO-600 Saltangará Faroe Islands Phone +298 770 700
blakross@blakross.fo www.blakross.fo

**Árlig fíggjarætlan, “Øll hava rætt til góð barnaár” kr.**

| | |
|---|---|
| 3 ársverk | 1.300.000 |
| Supervisión 2 tímar um mðr. pr. starvsfólk | 90.000 |
| Fakligmenning/ skeið | 30.000 |
| Altjóða samstarv og ferðing | 30.000 |
| Hølisleiga, ljós og hiti | 120.000 |
| Útgerð/innbúgv/viðlíkahald | 25.000 |
| Bøkur og annað tilfar | 10.000 |
| PR og prentlutir | 20.000 |
| Fyrisiting | 12.000 |
| Grannskoðan | 6.000 |
| Tiltøk/verkætlanir | 150.000 |
| **Í alt** | **1.793.000** |

BKF ætlar, at “Øll hava rætt til góð barnaár” skal "lofta" øllum teimum børnunum, sum enn líða undir rúsmisnýtslu í familjuni. Vit vita av royndum, at tað kann vera ringt at bróta sosiala arvin, tá rúsmisnýtsla hevur verið gerandiskostur í fleiri ættarlið. Tíverri kunnu vit eisini staðfesta, at í ávísum familjum kenna vit í dag til, at fimta lið í somu familjum framvegis ikki hevur brotið sosiala arvin -men vit hava ikki mist vónina um, at tað eisini ber til at hjálpa børnum og vaksnum í slíkum familjum.

Vit møta ferð eftir ferð, at børnini í okkara samtalubólkum siga, at tað er fyrstu ferð, at nakar yvirhøvur hevur lurtað eftir svarinum hjá barninum, tá ið vaksin hava spurt “Hvussu hevur tú tað?” Um svarið ikki er jaligt og lívsjáttandi, so snúgva tey vaksnu sær ofta undan at lurta og gera nakað. Ofta tí tey eru ósikkur og ikki vita, hvat tey skulu siga og gera.

Heiðavegur 32 FO-600 Saltangará Faroe Islands Phone +298 770 700
blakross@blakross.fo www.blakross.fo

Okkara visión er at gera nakað við hesar avbjóðingarnar. Vit kunnu við vissu staðfesta, at “Øll hava rætt til góð barnaár” hevur longu prógvað sín leiklut í hesum sambandi.

Tí søkja vit hervið um eina játtan á kr. 1.793.000 til “Øll hava rætt til góð barna ár”.

Hjálagt leggja vit eina power-point framløgu, sum útgreinar arbeiði í "Øll hava rætt til góð barnaár".

Eisini leggja vit eina raport um ACE SCORE kanningar frá CDC (Center of Disease Control and Prevention) og Kaiser Permanente, útgreinað til føroysk viðurskifti innan ungdóm, sjúkuviðgerð og fyribyrgingararbeiði hjá Bláa Krossi Føroya.

Virðingarmest

**Blái Krossur Føroya**
/fyribyrgingardeildin

**Alisa Hammer**
fyribyrgingarleiðari

Heiðavegur 32 FO-600 Saltangará Faroe Islands Phone +298 770 700
blakross@blakross.fo www.blakross.fo